# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Størri samheldsfesti

Í vikuni hevur útvarpið hjá Kringvarpinum havt sera áhugavert og viðkomandi tema á skránni. Sendingar og orðaskifti um tey gomlu og fíggjarligu korini hjá teimum hevur verið væl úr hondum greitt, og ikki minst áhugavert hevur tað verið at hoyrt tey gomlu sjálvi – kring alt landið – sleppa til orðanna.

Tað er skjótt at staðfesta, at tey gomlu ella pensionistarnir ikki eru homogenur samfelagsbólkur. Summi eru so væl fyri, at tey hava pensión í arbeiðnum, onnur hava krígspensión ella krígseinkjupensión, og so eru tað tey, sum ikki hava annað enn fólkapensiónina á at líta.

Tað eru serliga hesi seinast nevndu, sum ikki eru nóg væl fyri, og tað eru hesi, sum detta niður ímillum, nú tað verður arbeitt við at venda soleiðis, at hvørt ættarliðið skal hava ábyrgd av síni egnu pensión. Hetta takið er stórt, tí higartil hevur tað verið soleiðis, at eitt ættarliðið hevur rindað pensión fyri tey, sum frammanundan hava verið á arbeiðsmarknaðinum.

Spurningarnir eru nógvir, nú stóra takið skal takast. Samstundis eru tað viðurskifti, sum vit øll eiga at fegnast um. Eitt teirra er Samhaldsfasti arbeiðsmarknaðargrunnurin. Burðurin av Samhaldsfasta var tungur. Men tíbetur eydnaðist tað við Vilhelmi Johannesen sum oddvita at fáa lógina samtykta, og nú er Samhaldsfasti vorðin so mikið stórur og týdningarmikil, at tað er ræðslutanki at hugsa sær, at hann ikki var.

Tað eru eisini verkafeløg, sum longu fyri mongum árum síðani sóu týdningin av, at teirra limir vórðu tryggjaðir eina arbeiðsmarknaðarpensión ígjøgnum fakfelagið. Fremst í huganum er Havnar Arbeiðsmannafelag, sum við Karli Johanesen, sála, sum oddvita syrgdi fyri, at limirnir fingu pensión, sum kemur væl við aftrat fólkapensiónini og Samhaldsfasta.

Skiftandi samgongur og landsstýri hava í mong ár beint spurningin um pensiónsviðurskiftini í ráð og nevndir at arbeiða við og útgreina. Nú sigst hetta arbeiðið at vera komið væl áleiðis, og nú hevur tað verið at hoyrt frá Landsfelagnum hjá pensionistum, at nýggja skipanin fer at bera við sær, at umstøðurnar hjá teimum, sum nú eru pensionistar, fara at verða uppaftur verri, enn tær eru.

Hetta síðsta hava vit ikki møguleika at taka dagar ímillum. Men við forsøgnunum í huga um, hvussu lutfallið millum pensionistar og tey á arbeiðsmarknaðinum í framtíðini fer at verða, so nyttar ikki at halda fram við at mæla sum hundur um heitan greyt:

Tað er neyðugt at gera upp við fatanina av, at allir pensionistar skulu fáa somu grundupphædd, og at allir pensionistar skulu fáa somu sømdir á so mongum økjum. Tað er neyðugt, at tað almenna fer at taka sær meiri av teimum, sum eru ringast fyri, og so gerst tað ikki við, um tað í framtíðini fer at verða soleiðis, at tey, sum á fleiri øðrum økjum eiga ágóðar sum pensionistar, skulu gjalda meiri ella fáa minni.

Á sama hátt sum progressivitetur í landsskattinum er hetta samhaldsfesti, sum vit ikki eiga at renna undan, um vit vilja halda tørn um vælferðarsamfelagið, sum vit siga okkum vera so fegin um.

**Sosialurin**

## Lítið yvir Føroya land...

**SIGNAR P. HEINESEN**



Føroyska tjóðin stendur spyrjandi. Fólk flest hava varhugan av, at leiðin er ikki gongd.

Eygu venda sær ímóti politisku skipanini. Tann einstaki politikarin vendir sær ímóti fólkinum og roynir eftir førimuni at tekkjast. Ein heldur, at summarfrítíðin hjá løgtinginum skal avbrótast. Annar heldur, at ein savningarstjórn er neyðug. Triði roynir at seta kílar í samgonguna. Allir hava teir sín leiklut í støðuni. Meir og minni. Umframt okkum onnur.

Støðan í Føroyum í dag er eitt úrslit av tí strategiska kyksendi, sum tjóðin hevur verið í seinastu tvey áratíggjuni. Fíggjarkreppan uttaneftir er tann ódnin, sum ein tjóð í strategiskum kyksendi ikki megnar at liva ígjøgnum. Tað ber sjálvsagt til at vóna, at ódnin hasar av, áðrenn tjóðin er kollsilgd. Tað hepnast kanska – kanska ikki.

Um tað kanska hepnast, siglir tjóðin vandasjógv kortini. Tí tilverugrundarlag føroyinga við tí livistøði, vit hava vant okkum við, kann ikki longur mennast við støði í fiskivinnuni eina. Tvey áratíggju uttan nakra nýskapan av týdningi í tilverugrundarlagnum er nýtt fyribrigdi í Føroyum síðani seinna heimsbardaga. Síðani tá og fram til áttatiárini var tjóðin eyðkend við, at hon lyfti uppgávurnar í felag. Í dag er øðrvísi.

Tað hevur verið sagt millum ábyrgdarfólk, at vit mega hyggja eftir hvørjum einstøkum smáluti í fíggjarlógini. Eg vil mæla ábyrgdarfólki til at hyggja upp frá fíggjarlógini – upp um gerandis keglið á Tingi, upp um "dagsins kreppu" í onkrum lands- ella kommunustovni.

Tað er ikki tann einstaka upphæddin á fíggjarlógini, sum ger tann stóra skaðan. Tað er mátin, fíggjarlógin verður sett saman, sum er høvuðsorsøkin til tey ørandi tølini – og til, at tað gerst alt truplari at fáa tamarhald á hvørjari einstakari upphædd. Eins væl er tað orsøkin til, at tað gerst alt truplari at fáa gott verk til høldar í ítøkiligum úrslitum.

Tí eru hyggjuráðini at bæði politikarar, og fólk við samfelagsáhuga annars, líta uppum smálutirnar og inn í gerandisdagin hjá flestu okkara – og spyrja spurningin: "Skal veruliga alt hetta til, fyri at skipa okkum 50.000 friðarfólk í okkara gerandisdegi? Kann hetta ikki gerast betur?

Tann politikarin, sum hevur áhuga og vilja til at gera ábøtur í verki, hevur eisini møguleika til tað, hvørt viðkomandi er í landsstýri, í samgongu ella í andstøðu. Í tí høpi kunnu vit onnur eftir førimuni geva okkara íkast í tann mun, sum ábyrgdarfólk ynskir tað. Ítøkiliga.

## Góði Kringvarpsstjóri - hvørjum bíðar tú eftir ?

**TORDUR J. NICLASEN**
Eysturoyar Røktar-og ellisheim



Í Degi og Viku 27 januar vísti kringvarpsstjórin m.a. á, at ein kanning vísti, at uml. 50% av lurtarunum sløktu, tá tað kom til morgunandaktini kl. 9,50. Hetta tyktist at vera grundgeving fyri avgerðini um ikki at endursenda morgunandaktina.

Fyri tíð síðan var sami kringvarpsstjóri frammi og avdúkaði, at nýggj kanningin nú vísti, at tað vóru uml. 75% fyri, at andaktin varð endursend.

Logiska niðurstøðan hjá fleiri túsund pensionistum og øðrum var so sjálvandi, at nú varð ítøkiligt grundarlag hjá kringvarpsstjóranum at taka avgerð um at endursending av morgunandaktini kl. 9,50!

Loyvi mær tí nú at reisa spurningin til kringvarpsstjóran: »hvørjum bíðar tú eftir?«

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.